Tórshavn 13. september 2018

Etiska ráðið
Granskingarlonin
J.C. Svabosgøta 43
100 Tórshavn

Til
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn
amr@amr.fo

**Hoyring um uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)**

Etiska ráðið hevur fingið omanfyrinevnda lógaruppskot til hoyringar.

Uppskotið til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin) er lisið og viðgjørt sambært hugtøkunum paternalisma og autonomi.

Ásannandi, at tað kann verða tvørligt og ofta ómøguligt at lýsa við dømum, nær smærri og størri inntriv eru til gagns fyri persónin, sum talan er um, so tykist lógarsmíðið, eins og viðmerkingarnar, at verða farið út í æsir við at tryggja autonomiina hjá persóninum, og samstundis tykist lógaruppskotið og viðmerkingarnar eisini at hava innbygt øll neyðug fyrilit hjá myndugleikum og starvsfólkum, so at tey kunnu røkja sína alneyðugu paternalistisku uppgávu sum best.

Ein tvingsilsnevnd er eitt gott og neyðugt átak og kann ikki minst standa vernd um tann persónin, sum skal verða fyri inntrivum.

Etiska ráðið viðmælir lógaruppskotið uttan broytingaruppskot.

Vinarliga

Vegna Etiska ráðið

Hildur við Høgdalsá, forkvinna